Høgni Hoydal í formansfrágreiðingini á Flokstinginum:

# Fullveldi í komandi valskeiði

**Tjóðveldisflokkurin skal í landsins leiðslu. Føroyar hava ikki ráð til 4 ár aftrat við stillstøðu, har vit mala í klingur við vantandi felags málum, og bert seráhugamálini vinna. Føroyar hava ikki ráð til aftur at liggja frælsissjóvarfallið av okkum. Fullveldið skal takast í komandi valskeiði, segði Høgni Hoydal í formansfrágreiðing síni á flokstingi Tjóðveldisfloksins í Miðvági um vikuskiftið**

FLOKSTING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Høgni Hoydal var sum altíð vælorðaður í síni formansfrágreiðing*

*Mynd: Leo Poulsen*

Einki floksting uttan eina formansfrágreiðing.

Og har var nóg mikið fyri oyra hjá teimum umleið 100 fólkunum, ið høvdu leitað sær innar í bygdarhúsið í Miðvági leygarmorgunin.

Formansfrágreiðingin innihelt eisini alt tað, ið roknast kann við, serliga tá hugsað verður um, at flokkurin seinastu trý og eitt hálvt árið hevur sitið í andstøðu. Høgni Hoydal vísti eisini á, at tað er alneyðugt, at Tjóðveldisflokkurin í komandi tingsetu fær ávirkan, og helst verður so stórur, at hinir flokkarnir ikki sleppa uttan um at hava Tjóðveldið við í eini komandi samgongu.

Høgna líkt er frágreiðingin væl orðað, og leggur dent á tað alneyðuga í, at flokkurin eftir valið komandi fer at mynda føroyskan politikk aftur.

Og formaðurin metur, at flokkurin er væl fyri at taka upp valstríðið.

- Vit hava greið mál og ítøkilig uppskot á øllum samfelagsøkjum. Meiri enn 80 greið og væl gjørd uppskot – umframt egin fíggjarlógaruppskot og broytingaruppskot – hevur Tjóðveldisflokkurin lagt fyri tingið seinastu trý árini. Um fullveldismál, sosialar betringar, heilsumál, rættartrygd, javnstøðu, búskaparog fíggjarpolitikk, vinnubygnað, mentanarpolitikk, umhvørvismál, útbúgving, gransking, økismenning, skúlabyggingar, samferðslu, o. s. fr., segði Høgni Hoydal.

### Stongsulin brótast

Formaðurin vísti á, at »breiða semjan« bara hevur merkt, at allar hugsjónir, mál og prinsipp verða løgd til viks til frama fyri sonevndum samgongusemjum, har sterkastu áhugabólkarnir fáa síni sjónarmið ígjøgnum. Eisini hóast stóri meirilutin vil nakað heilt annað, og tað gongur beint ímóti tí, sum flokkarnir annars siga seg standa fyri og fara til val uppá.

- Eisini hesin stongsulin skal brótast. Eisini her mugu vindeyguni latast upp og frískir tjóðveldis- og frælsisvindar blæsa, segði Høgni Hoydal.

- Tjóðveldisflokkurin skal í landsins leiðslu. Føroyar hava ikki ráð til 4 ár aftrat við stillstøðu, har vit mala í klingur við vantandi felags málum, og bert seráhugamálini vinna. Føroyar hava ikki ráð til aftur at liggja frælsissjóvarfallið av okkum. Fullveldið skal takast í komandi valskeiði, segði Høgni Hoydal víðari.

Síðani tók formaðurin nøkur brot burtur úr stevnuskrá floksins við viðgjørdi hesi brot fyri brot. Og fleiri ferðir undirstrikaði Høgni Hoydal, at flokkurin er væl brynjaður til at taka við landsins leiðslu í komandi valskeiði. Fleiri týdningarmikil uppskot liggja klár, og nevndi formaðurin uppskot um føroyska grundlóg, uttanríkismál, útlendingamál, løgreglu og rættarskipan, búskapargrunn, tilfeingisbúð, framtíðar pensjónsskipan, mentanarframtøk, hægri lestur, kommunala útjavnan, skattapolitikk, eftirskúlar, náttúrunevnd og mangt annað.

### Fremst í javnstøðumálum

Eitt annað, ið formaður Tjóðveldisfloksins eisini nam við, er spurningurin um javnstøðu. Vit nevndu í blaðnum í gjár, at Unga Tjóðveldið hevði tikið javnstøðustigið fult út og hevur nú tveir formenn, eina kvinnu og ein mann. So langt hevur Høgni Hoydal kanska ikki hug at ganga, men hann vísti á, at hóast flokkurin í mun til hinar stóru flokkarnar á tingi gekk á odda, so er hetta eitt mál, ið Tjóðveldið eigur at gera nógv meiri við.

Flokkurin hevur gingið undan í javnstøðupolitikki, og tað er mest takkað verið kvinnufelagsskapum og teimum kvinnum, sum hava gjørt eitt megnararbeiði inni í flokkinum.

Og tað er størsta orsøkin til, at Tjóðveldisflokkurin hevur havt 5 valdar kvinnur á tingi gjøgnum tíðirnar, tríggjar landsstýriskvinnur umframt eina røð av framstandandi kvinnum í kommunalpolitikki gjøgnum tíðirnar, segði Høgni Hoydal á flokstingi Tjóðveldisfloksins um vikuskiftið.

# Úr stongsli í samband – flokstingið 2007

Á Flokstingi Tjóðveldisfloksins 23. & 24. mars, bleiv fylgjandi yvirlýsing samttykt:

**Floksting Tjóðveldisfloksins 2007 staðfestir, at:**

1. Loysing og frælsur uttanríkispolitikkur er høvuðsfortreytin fyri vinnuligari og samfelagsligari menning í Føroyum.

2. Støðug menning av vitanartilfeinginum gjøgnum mentanaríløgur, útbúgving og gransking á høgum støði er ein grundleggjandi fortreyt fyri framtíðar búskaparligum vøkstri í Føroyum.

3. Tvørrandi javnstøðan millum kynini elvir til, at samfelagið ikki fær ágóðan av tí ovurstóra tilfeingi, virkisfýsni og fjøltáttaða hugsanarhátti, sum kvinnur umboða. Tí eru javnrættindi ein sjálvsagdur lutur í samfelagsligu menningini.

4. Broytta samfelagsmynstrið hevur elvt til, at føroyska almannalóggávan er ótíðarhóskandi. Tí er tørvur á eini gjøgnumgangandi endurskipan av almannalóggávuni, har henda verður grundað á føroysk viðurskifti.

5. Einskiljingartilgongdin av fyritøkum landsins má skipast soleiðis, at føroyska fólkið og samfelagið fær sum mest fyri sína ogn. Eftir einskiljingina eiga fyritøkurnar framhaldandi at virka sum ein náttúrligur partur av búskaparligu menningini.

**Flokstingið vil**

1. At Tjóðveldisflokkurin skal í landsins leiðslu, tí Føroyar hava ikki ráð til 4 ár afturat, har ríkisrættarliga støðan forðar okkum í at virka á jøvnum politiskum og vinnuligum føti í einum altsamt meira altjóðagjørdum heimi. Royndirnar í Íslandi hava víst okkum, at ein virkin uttanríkistænasta er ein avgerandi fortreyt fyri, at vinnulívið kann menna seg uttan fyri landoddarnar. Tí er tað til óbótaligan skaða fyri føroyska vinnulívið og samfelagið sum heild, at heimastýrisskipanin verður nýtt sum undanførsla fyri at taka slík stig.

2. At Tjóðveldisflokkurin orðar ein greiðan, ítøkiligan og visioneran mentanar-, útbúgvingar- og granskingarpolitikk, sum miðar ímóti einum høgum fakligum støði í føroysku mentanar- og útbúgvingarskipanini. Somuleiðis skal Tjóðveldisflokkurin orða ein ungdómspolitikk.

3. Tjóðveldisflokkurin skal ganga undan í javnstøðupolitikkinum. Hetta verður gjørt við at tryggja javnvág millum kynini í skipan floksins. Somuleiðis skal Tjóðveldisflokkurin virka fyri, at kvinnuumboðanin í politisku skipanini verður munandi betri, enn hon er nú.

4. Vantandi vitan um veruligu støðuna og sosiala tørvin hevur í alt ov mong ár myndað sonevnda vælferðarpolitikkin í Føroyum. Tí skal Tjóðveldisflokkurin í eini komandi samgongu tryggja, at ein kortlegging verður framd av sosialu støðuni og rættindunum hjá teimum veikastu samfelagsbólkunum, so skipanirnar verða endurskoðaðar frá botni.

6. Tjóðveldisflokkurin skal virka fyri, at ávísir bólkar ikki skulu fáa framíhjárætt í einskiljingini av landsins ognum, so hesi síðani kunnu selja ognirnar víðari við stórum vinningi. Einskiljingartilgongdin má ikki enda við, at vit skapa eitt nýtt stættarsamfelag, eins og vit hava sæð í øðrum londum, har ójavnin verður ovur stórur millum tey ríkastu og vanliga fólkið.



*Eini 100 fólk vóru á flokstingi Tjóðveldisfloksins í Miðvági um vikuskiftið.*

*Mynd: Leo Poulsen*

**Miðvágur 23. - 24. mars**
**Tjóðveldisflokkurin**